gult24 cyan24 magenta24 svart24



# Max á sigurstrúnini



*Max Rasmussen hevur í mong ár verið roknaður sum fremsti leikarin her á landi, men fram til í ár hevði tað ongan tíð eydnast honum at vinna FM fyri einstaklingar*

**Max Rasmussen á Tvøroyri vann alt, sum vinnast kann í billard, nú billard-kappingin endaði herfyri. Saman við Eyðun Gullok Svalbard vann hann FM-heitið fyri lið, og stutt eftir ta? vann hann eisini FM kappingina fyri staklingar.**

BILLARD
*Jákup Mørk*

## Staklingakappingin

Umleið 30 spælarar luttóku í innleiðandi umfarinum í staklingakappingin, sum varð spælt í Havn. 10 komu víðari og spældu í tveimum bólkum í Fuglafirði ogt í Klaksvík. Av hesum komu so fýra víðari til endaliga umfarið, sum varð spælt í Klaksvíkar Klubba. Teir fýra vóru Max Rasmussen, Jan Müller, Sonhard Johannesen og Niels Nielsen. Úrslitið gjørdist, at Max fór við sigrinum, nr. 2 gjørdist FM-meistarin frá í fjør, Sonhard, nr. 3 Jan og nr. 4 Niels. Hetta er fyrstu ferð, at Max Rasmussen verður føroyameistari í billard fyri einstaklingar. Max, sum hevur roynst bestur í billardspællinum nú í mong ár var tí eisini ovurfegin, tá hann á samkomu hjá Føroya Bjór tók ímóti steyp inum, sum sjónliga tekini um FM-heitið.

Tað er annars vert at leggja afturat, at hetta er annað árið á rað, at ein spildurnýggjur føroyameistari verður funnin. Hóast bæði Sonhard og Max í nógv ár hava talst millum bestu billardleikararnar her á landi, so vóru árinin í fjør og í ár fyrstu ferð, at teir báðir hava vunnið seg upp á tindarnar í einstaklingakappingini.

## Liðkappingin

Tvøroyrar Klubbiu gjørdist enn einaferð FM meistari fyri lið. Á liðnum vórðu teir báðir, Max Rasmussen og Gullok, og í endaumfarinum gjørdu teir púra bart, og vunnu allar dystirnar.

Liðkappingini hevur annars koyrt eftir einum nýggjum leisti í ár, sum varð ætlaður til at hækka um støðið í fremstu deildini, og sum skilst á lagnum, hevur hetta eisini roynst hampuliga væl. Sterkastu leikararnir hava við hesi skipanini fingið fleiri dystir sínámillum, men stóð heilt væl til, kundi kappingin ivaleyst verið enn harðari. Eitt nú teljast Jan Müller og Steinbjørn í Dali framhaldandi millum stinnastu billardspælararnir í landinum, men hvørgin av hesum hevur í ár tikið lut í liðkappingini. At teir teljast millum teir allar bestu verður helst eisini undirstrikað av triðja plássinum, sum Jan vann sær, hóast hann hevur fingist millum lítið og einki við billard í vetur.

Tá alt kom til alt, hevði Tvøroyrar Klubbi vunnið sær 50 stig, Klaksvíkar Klubbi hevði 36 stig, meðan Vágs Klubbi á triðja plássinum hevði 35 stig. Hægsta snittið í kappingini hevði eisini Tvøroyrar Klubbi við23 í miðal, meðan Vágs Klubbi hevði næst hægsta snittið við 22,3 eygum. Klaksvíkar Klubbi hevði 21,1 eygu í miðal.

Í næstbestu deildini eydnaðist Kagganum at vinna kappingina við 41 stigum. Nr. tvey gjørdist Mimir við 41 stigum, meðan Tvøroyrar Klubbi hevði 32 stig. Her hevði Mimir annars hægsta snittið við 15,3 eygum, meðan Kaggin hevði 14 eygu í miðal. Tvøroyrar Klubbi hevði 12,8 eygu í miðal.



*Teir fýra leikararnir í finaluumfarinum vóru Niels Nielsen, Jan Müller, Sonhard Johannesen og Max Rasmussen. Endaliga raðfylgjan varð tó hin øvugta*



*Max Rasmussen og Eyðun Gullok Svalbard fáa her handað steypið fyri liðkappingina*

gult25 cyan25 magenta25 svart25



## TIT SPYRJA VIT SVARA



*Bergur Hanusson, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*

LØGFRØÐINGURIN

### Hevur eigari loyvi at koyra leigara út?

Hvussu er vorðið við leigulóg í Føroyum? Hvørjar treytir fylgja við uppsøgn av leigusáttmála? Báðar vegir. Hevur eigari loyvi at koyra leigara út, uttan at annar bústaður er funnin?

*Í Føroyum er ein leigulóg frá 1940 galdandi fyri íbúðarleigu. Tó er leigulógin bert galdandi fyri leigumál í Tórshavnar Kommunu og Tórshavnar uttanbíggja kommunu. Aðrastaðni í Føroyum er eingin leigulóg galdandi.*

*Um leigumálið er har leigulógin er galdandi, so kann leigumálið frá útleigarans síðu bert verða sagt upp við ávísum grundgevingum. Til dømis orsakað av væntandi gjalding av leiguni ella tí leigarin hevur ein slíkan atburð, at hann er til munandi ampa fyri útleigaran. Leigarin kann siga upp við rímuligari freist.*

*Um leigumálið er har leigulógin ikki er galdandi, so eru treytirnar fyri eitt nú uppsøgn, tær sum leigari og útleigari hava avtalað. Er einki avtalað um eitt nú uppsøgn, vil eg meta, at báðir partar kunna siga leiguavtaluna upp við rímuligari freist.*

*Rættindini hjá útleigaranum at koyra leigaran út, eru ikki treytað av um leigarin hevur funnið annan bústað.*

FØÐSLU- OG HÚSARHALDSFRØÐINGURIN

### Saft fyri mjólk

Ferð eftir ferð hoyra vit ávaringar um, hvussu skaðiligt tað er, serliga fyri børn, at tey eta ov nógv sukur nú á døgum. Ikki minst hevur sukurnýtslan vundið uppá seg, eftir at vit fingu sodavatn í 0,5 og 1,5 liturs fløskum, samstundis sum tað nú bara kostar ein brotpart av tí, sum tað hevur kostað. Eisini í saft er sera nógv sukur og ávarað verður ímóti bæði einum og øðrum slagi av saft. Men er tað onki sodavatn, ella ongin saft, sum foreldur ekkaleys kunnu geva børnum sínum - við máta sjálvsagt? Er tað nakar munur á vanligari saft, og vanligum sodavatni og so teimum sløgunum, sum eru merkt “light” ella “sukurfrí”?

*Alt sum vit gera við máta er óskaðiligt. Um vit bert av og á geva børnunum saft ella sodavatn so er tað næstan líkamikið um tað eitur light ella ikki. Grundin til, at heilsumyndugleikarnir ávara ímóti, at børn drekka ov nógv av saft ella sodavatn er at tað millum annað tekur plássið frá mjólkini. Børn skulu drekka ein hálvan litur av mjólk um dagin soleiðis at tey fáa eina sterka beinagrind. Ov nógv saft ella sodavatn kann eisini hava keðilig árin á tennirnar, tí ov nógv sýra (lágt Ph niðanfyri 5,7) kann skaða emaljuna á tonnumum. Ein nýggj kanning vísur, at ov stór nýtsla av saft ella sodavatn økir um vandan fyri yvirvekt hjá børnum.*

*Munurin á vanligari saft og sodavatn og so tí ið er merkt við light ella sukurfrí er tann, at í light ella sukurfrítt er ikki tilsett vanligt sukur, men eftirgjørt søtievni. Eftirgjørt søtievni hevur tann eginleika at tað smakkar søtt, men gevur ongar ella heilt fáar kaloriur.*

DJÓRALÆKNIN

### Hvølpur óður eftir sukurlátu

Vit eiga ein fittan hundahvølp, sum er óður eftir sukurlátu. Men nú hevur onkur fortalt mær, at sukurláta er eitur fyri hundahvølpar og í ringasta føri kunnu teir doyggja av fáa ov nógva sukurlátu. Er hetta rætt? Hví er sukurláta so eitrandi fyri hundar, og, hvussu nógv skal til, áðrenn vandi er á ferð. Hvussu leingi veksur hundahvølpur?

*Tað kemur meiri enn so fyri, at hundur verður eitraður av at eta sukurlátu. Serliga er hetta um høgtíðirnar, til dømis um páskirnar, tá ovmikið er til av sukurlátu. Í sukurlátu er rættuliga fitt av evninum theobromin, sum er eitt evni av methylxantin slagnum á sama hátt sum koffein, sum er í kaffi og te. Í mjólkarsukurlátu eru um 1,5 mg/g, í myrkari sukurlátu 5,3 mg/g og í reinum kakao 13,7 mg/g av theobromin. Hundur tolir smærri nøgdir av hesum evninum enn til dømis fólk. Eitrandi skamtur hjá hundi er millum 100-150 mg av theobromin pr kilo av hundi. Hetta vil siga, at um ein miðal seyðahundur etur eitt kilo av mjólkarsukurlátu, 280 g av myrkari sukurlátu ella 100 g av kakao, verður hann sjúkur av hesum. Etur hann meira, er vandi fyri, at hann doyr.*

*Møguleikin fyri, at ein hundur etur eitt kilo av mjólkarsukurlátu, er kanska ikki so stórur, men fær hann smakk fyri sukurlátu, er skjótt, at hann kann eta 100 g av kakao, sleppur hann fram at tí.*

*Eingin orsøk er heldur at geva hundinum sukurlátu at eta. Hetta er ikki fóður til hundar, og vandin fyri eitring er til staðar. Etið tí páskareggini sjálvi, og gevið hundinum okkurt meiri hóskandi hundafóður.*

*Ymiskt er, hvussu leingi hundahvølpar vaksa. Smærri hundasløg eru fyrr fullvaksin enn størri hundasløg. Til dømis er ein puddilhundur fullvaksin tá hann er um átta mánaðir og ein Grand Danois er fullvaksin, tá hann er gott og væl eitt ár.*

**Spyrjið serfrøðingarnar**

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo

## VIÐMERKINGAR

# Ætla teir eisini at skerja okkum skrivifrælsi?

**Birgir Mohr**
*Sandur*



Sum ein sjálvuppgjørdur professari, hevur ein maður av Kirkjukletti suðuri í Vági, nevndur Kaj Vágfjall (fyrr Kaj Smith) skriva drúgvar greinar í bløðunum fyri tíðina, hvar hann við haturskendari skriving og gomlum briksli førir seg fram sum sannleikavitnið mikla.

Hettar er torfør uppgáva, tí í politikki sær sannleikin ofta ymiskt út frá einum politiskum flokki til annað. Slíkt orðaskvaldur, sum Mr. Vágfjall førir fram sum einasta sannleikan, tað eigur ikki aftursvar uppiborði, tað er frameftir, ein má hyggja.

Men tað hesin maðurin, sum einamest er kendur í fjølmiðlunum sum láturverji loysingarfloksins og beint nú er valdur til aðalstjórnarlim í tjóðveldisflokkinum, sigur seg vera sjelkaðan yvir, at vit – hóast vit enn eru undir danadrotning – hava talu- og skrivifrælsi, og tað uttan mun til, hvørjum starvi vit eru í, so má talast at. Fara fullveldis-Føroyar at skerja okkum hettar frælsið? Tað vóni eg ikki.

Væl vitandi, at fullveldisskútan stendur rimmarføst á landi eftir ta fjóru ella fimtu strandingina í minni enn trý ár, so má eg átala hesum skrivihátti, um enn hann er partur av politiskum dugnaloysi.

Vit fara vónandi til alla tíð at hava fullan rætt til fult skrivifrælsi og at siga okkara meining, tó ósamd við ein mann, hóast – ella júst tí – hann er hálvur dani sjálvur, eftir øllum at døma ber mótvilja móti Danmark og øllum donskum, uttan at hava nakað betri at seta ístaðin – í løtuni í hvussu er. Men hann um tað.

Vit onnur hava upplivað og kenna heilt øðrvísi fyri Danmark, dønum og øllum øðrum fólkum ikki minst føroyingum.

Vónandi fáa hvørkin flokkar ella persónar vald til at skerja okkara talu- og skrivifrælsi. Í løtuni eiga teir so ongan miðil at nokta øðrum at skriva í. Hesir hava flestir verið bestir omanfyri hálvølin, og so man vera í hesum føri eisini.